men krevur at verða arbeidd inn á ein felag plattform sum t.d. eitt talgilt, føroyskt skúlaatlas – t.d. við støði í kortsíðuni Landnám ella øðrum tænastum, ið longu nú finnast á føroyska marknaðinum.

### Talgilt tilfari – bæði bíligari og betri

Skúlabókagrunnurin – ið nú er lagdur undir nýggja stórstovnin "Vitanardepilin" – hevur sum endamál at framleiða undirvísingartilfar. Tað er av sonnum týðandi hjá einum samfelagi at hava ein slíkan stovn, tí annars vóru vit noydd til einans at nýta útlendskt tilfar. Men trupulleikin er sum nevnt, at tað framvegis í so stóran mun eru fysiskar bøkur, ið verða framleiddar.

Hóast vit við Snar hava ein hentan distributiónsportal, so verður hesin ikki nýttur til fulnar. Gaman í liggjan nakrar bøkur teldutøkar á Snar (og á heimasíðuni hjá Skúlabókagrunninum), men hví ikki venda øllum við og siga, at bøkurnar primert verða lagdar á Snar og einans sekundert verða prentaðar fysiskt gjøgnum onkra print-on-demand skipan?

Tað er ein bjarnatænasta fyri føroysku útbúgvingarskipanina, at vit nýta so nógva megi til prentað tilfar. Vit eru av sonnum inni í einum paradoksi, tí hóast vit nýta nógvan pening til at prenta tilfar, so gera vit harvið tilfarið verri. Vit nýta faktiskt pengar til at skapa eina negativa virðisøking!

Tá ein mynd kemur á prent, fara sera nógvar detaljur fyri skeyti, id annars mega liggja í pixlunum í talgildu myndini. Harumframt missir myndin tær databasutengdu upplýsingar, id kunnu liggja í myndum, ið hava fleiri løg – eins og vit sóu í døminum um korttilfar.

Fyri ikki at tala um, at tað er munandi lættari at lesa talgilt tilfar, tí man kann velja at undirstrika ávís orð, man kann gera tekstin størri ella minni, man kann formatera tekstin, men kann kommentera tekstin. Og allar hesar manipulatiónir kann man deila við onnur.

Fáu fyrimunirnir, eg dugi at síggja vid prentaðum tilfari, eru at tad er gott at taka við á strondina ella í baðikarið. Í flestu øðrum førum er talgilda tilfarið munandi hentari, ikki minst nú man bara kann tveita sær telduna í lumman og nýta hana næstan allastaðni.

### Tilgongdin má byrja nú

Tey, ið varða av føroyskum undirvísingartilfari mugu endiliga ikki taka hesa tíðargrein sum eitt slag í andlitið. Tit gera eitt framúr arbeiði, men eru tíverri fangað í einari doyggjandi diskurs. Eg vóni, at tit taka rationalini í hesi grein til tykkara í staðin fyri at venda hin kjálkan til, tí í sídsta enda eru vit øll samd um, at tað snýr tað seg um at skapa gott undirvísingartilfar á føroyskum.

Rationalini við at gevast við at prenta tilfar eru fyrst og fremst, at vit spara pengarnar til prenting. Hesir pengar kundu í staðin verda nýttir til at løna teimum, ið skriva og ritsjórna. Umframt hetta er tað nógv lættari at distribuera talgilt tilfar, eins og tað er nógv lættari at handfara bædi hjá næmingum og undirvísarum. At enda er tað ein avgerandi fyrimunur, at talgilda tilfarið kann uppdaterast nær tað skal vera. Í staðin fyri at áratíggjugamlar bøkur liggja úti á bókasøvnum kring landið, kundu uppdateraðar bøkur ligið á t.d. Snar, klárar at taka niður fyri eitt ávíst gjald – ella í summum førum kanska ókeypis.

Sjálvandi mæli eg ikki til eina kollvelting innan føroyska bókaútgávu. Men neyðugt er at bróta burtur úr nýggjum, og tað hevur longu verið neyðugt í nógv ár. Tad eru sjálvandi framvegis fólk, id hava tørv á prentaðum tilfari, og tað eru heldur ikki allar lærugreinar, id eru so KT-tengdar sum t.d. landfrødi. Tad er ikki ein spurningur um antin ella, men um í størri mun at distribuera undirvísingartilfarið í teimum formatum, ið hóska til ta læringina, id fer fram í veruleikanum. Vit hava ikki ráð at liva í fortíðini, medan veruleikin kring okkum broytist við fullari ferð.



Zakarias Wang

# 64 ár seinni ikki ov seint at siga tøkk

Tann 14. september í ár hevði Johan Petersen eina áhugaverda grein í Dimmalætting. Hann hevur skrivað dúgliga um fólkaatkvøðuna 1946, og í hesi grein viðgongur hann, at loysingin fekk flestar atkvøður.

Vert er tí at líta at tí sum hendi tann 14. september 1946, tá fólkaatkvøða var.

Úrslitið var hetta:

*Sí talvu 1*

| Tal | Orðing | % |
|---|---|---|
| 5499 | Ynskja tygum danska stjórnaruppskotið sett í gildi? | 31,9 |
| 5660 | Ynskja tygum loysing Danmarkar og Føroya millum? | 32,9 |
| 481 | Ógildugar atkvøður | 2,8 |
| 5576 | Ikki við í atkvøðugreiðsluni | 32,4 |
| 17216 | Høvdu valrætt | 100 |

*Talva 1*

Johan hevur fullkomuliga rætt í, at loysingin fekk 1% meir enn stjórnaruppskotið, tí loysingin fekk 32,9% av øllum teimum, sum høvdu valrætt, meðan 31,9% heldur vildu hava stjórnaruppskotið.

Teir tingmenn, sum tann 10. mai 1946 samtyktu, at teir vildu fáa at vita, hvørja støðu Føroya fólk hevði til hesar báðar spurningarnar, vóru sambandsmenninir (O. F. Joensen, Andras Samuelsen, Johan M. Fr. Poulsen, Hans Iversen, Kristian Djurhuus) og javnaðarmenninir (J. E. Jacobsen, J. Fr. Øregaard, Jákup í Jákupsstovu, Johan Peter Davidsen, Peter Mohr Dam og William Smith).

Eftir orðabókini er ein atkvøða ein áskoðan, sum er givin til sjóndar á einum vali, munnliga, skrivliga ella við at rætta hondina upp. Tá menn á morgni koma saman í túninum at taka støðu til, um teir skulu fara á fjall ella ikki, hava teir fýra møguleikar. Ein er at siga: "Vit fara". Hin er at siga: "Vit fara ikki". Tann triði er at siga: "Eg taki ikki lut í atkvøðugreiðsluni". Fjórði valkosturin er als ikki at koma út í tún. Hesir síðstu siga í veruleikanum, saman við teimum, sum ikki taka lut í atkvøðugreiðsluni, við hinar: "Tit ráða!" og teir stuðla harvið tí størra av teimum fyrru bólkunum. Verður samtykt ikki at fara á fjall, fer eingin, og verður samtykt at fara, fara allir, teir sum søgdu at teir vildu fara, teir sum søgdu at teir ikki vildu fara, teir sum ikki atkvøddu, eins og teir sum ikki tímdu út í tún at taka støðu til málið.

Somu reglur eru galdandi í løgtinginum.

Hevði úrslitið á einum tingfundi verið tað sama sum á fólkaatkvøðuni, so skuldi formaðurin, eftir at tingmenn høvdu trýst á knapparnar, sagt frá, at úrslitið av atkvøðugreiðsluni var hetta:

*Sí talvu 2*

| Tal | Orðing | % |
|---|---|---|
| 10 | Ynskja tygum danska stjórnaruppskotið sett í gildi? | 31,9 |
| 11 | Ynskja tygum loysing Danmarkar og Føroya millum? | 32,9 |
| 1 | Ógildugar atkvøður | 2,8 |
| 11 | Ikki við í atkvøðugreiðsluni | 32,4 |
| 33 | Tingmenn | 100 |

*Talva 2*

11 høvdu atkvøtt fyri loysing, 10 fyri stjórnaruppskotinum og 1 atkvøða var blonk. Loysingin hevði tí meiriluta, og løgtingið hevði sostatt samtykt at hetta uppskot skuldi setast í verk.

Tað er júst tað sama sum hendir, tá ið vit hava eina fólkaatkvøðu sum hesa. Nøkur vóru, sum ikki tóku lut í atkvøðugreiðsluni, annaðhvørt tí tey ikki møttu upp, ella tí tey lótu inn ein seðil, sum var blankur ella á onkran annan hátt ikki til lítar svaraði teimum báðum spurningunum, sum Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin vildu fáa greiðu á. Hesi góvu tí undirtøku fyri tí største bólkinum, sum, sambært Johan og øllum øðrum skilamonnum, vóru tey, sum settu kross fyri spurningin: "Ynskja tygum loysing Danmarkar og Føroya millum?"

Úrslitið av fólkaatkvøðuni gjørdist tí:

*Sí talvu 3*

| Tal | Orðing | % |
|---|---|---|
| 5499 | Ynskja tygum danska stjórnaruppskotið sett í gildi? | 49,3 |
| 5660 | Ynskja tygum loysing Danmarkar og Føroya millum? | 50,7 |
| 11159 | Atkvøður íalt | 100 |

*Talva 3*

Vit kunnu øll fegnast um luttøkuna, og eisini um, at veljarar komu fram til valborðið og atkvøddu fyri stjórnaruppskotinum ella lótu inn ógildugan seðil, tí hesar atkvøður gjørdu, at valluttøkan kom heilt upp á 67,6%. Hetta var eitt nógv hægri tal enn tá íslendingar í 1918 høvdu sína fólkaatkvøðu um sjálvstýri, tí har tóku bert 43% av veljarunum lut. Yvirhøvur vísa royndirnar, at tað er sera torført at fáa meir enn 60% av veljarunum at møta upp tá fólkaatkvøða er, so vit kunnu av røttum siga, at í Føroyum var luttøkan óvanliga stór.

Nú høvdu Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fingið greitt svar upp á tað, teir løgtingsins vegna høvdu spurt um.

Danski forsætisráðharrin segði eisini beinanvegin, at hann var fúsur at taka upp samráðingar við løgtingið um at seta fólksins vilja í verk. Núverandi danski forsætisráðharrin Lars Løkke Rasmussen sigur somuleiðis, at stjórnin einki hevur ímóti slíkum samráðingum

Nú eru allir teir sambandsog javnaðarmenn deyðir, sum góvu Føroya fólki møguleikan fyri at siga, at tað vildi hava loysing Danmarkar og Føroya millum. Men framvegis kann alt Føroya fólk heiðra minnið um hesar menn við at seta tað í verk, sum teir góvu okkum høvi at velja. Sjálvandi er tað spell, at 64 ár eru farin, men betri er at siga tøkk í seinna lagi enn ikki at takka.